Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jørgen Niclasen, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Søla av hondkeypsheilivági í øllum handlum

Spurningar:

1. Ætlar landsstýriskvinnan at arbeiða fyri, at hondkeypsheilivágur kann keypast í øllum handlum?

Viðmerkingar:
Á bygd, har einki apotek er, er í dag møguligt at keypa vanligan hondkeypsheilivág í handlum, so sum høvuðpínutablettir v.m. Í teimum bygdum, har hondkeypsheilivágur kann keypast í handlum, er tað ein betri tænasta til borgaran. Í bygdum og býum, har apotek er í nærumhvørvinum, kann hondkeypsheilivágur einans keypast á apoteki. Har er sera avmarkað upplatingartíð og serliga í høvuðsstaðum langar bíðirøðir.

Hetta er ikki bert at gera mun á tænastu til borgarar, men er eisini kappingaravlagandi fyri handlar. Heldur enn at víðka tænastuna til borgarar, verður t.d. í Vágum brúktur nógvur peningur at gera eitt apotek, sum merkir, at hondkeypsheilivágur verður tikin úr handlunum í Vágum. Spurt verður, um ikki rættari er at fara hin vegin, t.e. loyva sølu av hondkeypsheilivági í øllum handlum í landinum.

Í sínum hoyringarskrivi til løgtingsmál nr. 49/2024 hevur Kappingareftirlitið eisini viðmerkingar um hetta. Kappingareftirlitið skrivar ma:

«Kappingareftirlitið viðmælir eisini, at farið verður eitt stig víðari og loyva sølu av hondkeypsheilivági í øllum handlum. Hetta hevði verið við til at økt um vælferðina hjá brúkarum í Føroyum, sum høvdu havt betri atgongd viðvíkjandi, hvar og nær tey kunnu keypa hondkeypsheilivág. Hetta er vorðið vanligt í okkara grannalondum.»

Á Løgtingi, 18. februar 2025

Jørgen Niclasen